# EG KUNDI HU
# AT KEYPT HÚ

– Eg vil gjarna frætta, um tað verður okkurt hús til sølu í Fugloy, tí eg kundi saktans hugsað mær at fingið eitt summarhús har einaferð, sigur danski sjónvarpsverturin Anders Lund Madsen, sum er fallin fyri Fugloy, eftir at hann hevur gjørt sjónvarpsrøð har

EYÐUN KLAKSTEIN

Danski sjónvarpsmaðurin Anders Lund Madsen, sum hevur gjørt sjónvarpstrírøð úr Fugloy, leingist aftur til Fugloyar og kundi hugsað sær at keypt summarhús í oynni.

– Eg royni at sannføra familjuna um, at tað er eitt gott hugskot at fáa okkum summarhús í Fugloy, sigur hann í telefonini av Østerbro í danska høvuðsstaðnum.

Sendirøðin, sum Danmarks Radio hevur framleitt, kallast Den Yderste Ø og er send á DR1 – nú verður hon eisini send í KvF. Sendingin byggir á upplivingar hjá Anders Lund Madsen í Fugloy í summar, tá ið hann og partur av familjuni búði í oynni í ein mánað.

– Fyri trimum árum síðani var eg í Grønlandi og búði í Ittoqqortoormiit í ein mánað. Tað gjørdu vit eina sjónvarpsrøð burtur úr, og tá ið eg hevði gjørt hana, fekk eg hug at gera tað sama úr Føroyum. Tíbetur vildi Danmarks Radio eisini verða við til at gera eina nýggja røð, og tí bleiv Den Yderste Ø veruleiki, sigur hann.

## Fullu fyri Fugloy

54 ár gamli Anders Lund Madsen er kendur miðlamaður í Danmark. Hann er útbúgvin journalist og hevur virkað á flestu økjum innan stórar miðlar – blað, útvarp, sjónvarp og internet. Hann hevur eisini staðið fram sum skemtari og sjónleikari á palli.

Í 1970'unum var Anders Lund Madsen saman við øðrum dønum í Føroyum í sambandi við lesnað á Roskilde Universitets Center. Tá búði hann umleið eitt hálvt ár í Føroyum, og hann hevur síðan sagt nógvar søgur um upplivingarnar her. Seinnu árini hevur Anders Lund Madsen vitjað fleiri ferðir í Føroyum – bæði í privatari frítíð og í sambandi við arbeiði.

– Nú vit skuldu gera eina sendirøð úr Føroyum, vildi eg finna okkurt, sum var fjarskotið. Eg havi verið so ofta í Føroyum og upplivað nógv støð, og tað er eisini gjørt nógv sjónvarp úr Føroyum. Tí vildu vit finna eitt serstakt stað at gera sendirøðina úr, sigur Anders Lund Madsen.

– Tá ið vit í apríl komu til Føroya at kanna møguleikarnar, høvdu vit tríggjar oyggjar í huga – Fugloy, Kalsoy og Mykines – men tá ið vit høvdu verið í Fugloy, var einki at ivast í. Har vildu vit gera sendirøðina, tí tað var eitt so fantastiskt stað. Tað tóktist sum júst tann rætta oyggin at vera í ein mánað, sigur hann.

Í fjør summar flutti Anders Lund Madsen við konuni og yngstu børnunum til Hattarvíkar at búgva nakrar vikur. Saman við teimum vóru eisini upptøkufólk, sum skuldu filma nakrar av upplivingunum og hendingunum í Fugloy.

– Vit vóru væl móttikin, og fólk vóru sera gestablíð. Eg veit væl, tað er eitt sindur irriterandi, at eg komi við einum upptøkuliði til Fugloyar at vera í ein mánað, men tey vandu seg við okkum, og tað gjørdist eitt deiligt summar, sigur Anders Lund Madsen.

– Onkur av fólkunum skuldu líka brúka nakað av tíð, áðrenn tey blotnaðu, og tað skilji eg ómeta-



*Anders Lund Madsen á vitjan hjá Emmu Sigvaldsdóttir í Fugloy*

## Fakta

*Anders Lund Madsen var føddur í Sorgenfri á Sælandi í Danmark í 1963.*

*Hann hevur útbúgving sum journalistur og hevur í nógv ár virkað innan miðlar í Danmark. Hann hevur skrivað eitt nú í Ekstrablaðnum, hann hevur gjørt nógvar útvarps- og sjónvarssendingar fyri Danmarks Radio, og hann hevur hildið fyrilestrar og skemtað.*

*Hann er giftur Karin Prehst Lund Madsen, og tey eiga dreingirnar Modig og Stærkodder og gentuna Fri. Hann eigur børnini Sofie My, Bjórk og Storm við Helle Lund Madsen, sum hann var giftur við fram til 2008.*

*Anders Lund Madsen hevur gjørt nýggja sjónvarpsrøð úr Fugloy, sum hann kallar Den Yderste Ø. Sendirøðin hevur verið sýnd á DR1, hon verður nú sýnd á KvF, og hon kann eisini síggjast á netvarpinum hjá DR.*

# UGSAÐ MÆR ÚS Í FUGLOY




*– Eg veit væl, tað er eitt sindur irriterandi, at eg komi við einum upptøkuliði til Fugloyar at vera í ein mánað, men fólkini vandu seg við okkum, og tað gjørdist eitt deiligt summar, sigur Anders Lund Madsen*

(MYND: DR)



*Fólk vandu seg so líðandi við donsku gestirnar í oynni*

liga væl. Vit komu til eitt friðarligt stað, har fólk ikki nýtast at tosa við nakran í fleiri dagar, og so gangi eg knappliga har og snakki allatíðina. Eg eri uppvaksin í Keypmannahavn, havi gjørt nógv radio og tosi nógv, og onkur helt eitt sindur speiskliga fyri, at eg skuldi farið aftur til Danmarkar, tí eg tosaði allatíðina, sigur Anders Lund Madsen.

– Fólk vóru tolin, tað verða tey helst av at búgva eitt slíkt stað, og tað var luksus, at eg kundi fara til eitt so fjarskotið stað og tosa mítt egna mál. Fólk vóru sera vinarlig og fyrikomandi, sigur hann.

## Friður

Tað er eitt vist pallskifti hjá danska miðlamanninum at fara úr danska høvuðsstaðnum, milliónabýnum Keypmannahavn, til Fugloyar, har stívliga fjøruti fólk búgva.

– Tá ið eg var barn, var eg onkuntíð í Tivoli um summarið. Har kundi eg koyra í rutsjubana, eta bomm og renna runt ein heilan dag og royna mangt og hvat. Tá ið vit so fóru avstað um kvøldið, og eg setti meg í bilin, legðist ein friður seg yvir alt. Eg hevði líknandi kenslu, tá ið eg kom til Fugloyar. Tað var ein stórur mótsetningur til Keypmannahavn, sum larmar allatíðina, og tað er fantastiskt, at eg ikki skal longur burtur og verða í longri tíð enn tað sama fyri at uppliva slíkan frið, sigur Anders Lund Madsen.

– Tað tók nakrar dagar at venja seg við, at einki hendir í Fugloy, men so koyrdi tað bara. Tað var øðrvísi at vera í Fugloy og í Eysturgrønlandi. Í Ittoqqortoormiit vóru vit nógv meira avskorin frá øllum, og tað vóru 800 kilometrar til nærmasta býin. Í Fugloy er fjarskotið og friðarligt, men tað er í grundini rættiliga sentralt. Ta kensluna dámdi mær væl, og eg má siga, at tað er hugtakandi, at fólk framvegis vilja búgva í oynni, sigur hann.

Familjan hjá Anders Lund Madsen treivst sera væl í Fugloy.

– Um summarið koma børn úr Klaksvík, Havn og aðrastaðni í Fugloynna at ferðast, og tey spæla nógv úti um kvøldarnar og út á náttina. Í Danmark spæla børn í miðal fýra tímar telduspøl um dagin, men í Fugloy var tað sum at fara aftur í tíðina, tá ið børn spældi saman uttan at nakar vaksin skuldi ansa eftir teimum ella skipa fyri. Míni børn gjørdust beinanvegin partur av tí.

– Tað er ein munur á at spæla úti í Fugloynni og í einari toppsikraðari fimleikahøll á Østerbro, og helst eru onkrir størri vandar í Fugloy, men tað er nógv stuttligari. Børnini fingu boð um, hvar tey ikki skuldu fara, og so hendi einki. Vit máttu eisini sleppa okkara trongd til at ansa eftir, og tað riggaði fínt, sigur Anders Lund Madsen, sum eini sjálvur fekk nógvar upplivingar í náttúruni í Fugloy.

– Skalt tú veiða fugl á Østerbro, mást tú koyra á dúgvur við bilinum. Tað er nakað annað at sita úti í náttúrini í Fugloy og stara og bíða, sigur hann.

## Leingist

Sendirøðin Den Yderste Ø gevur fólki eitt innlit í lívið og fólk í Fugloynni, og Anders Lund Madsen er fegin um, at hann hevur fingið dokumenterað hetta nú.

– Eg kann bara gita, men tað kann verða, at um 20-30 ár búgva ógvuliga fá fólk í oynni, og tá verður oyggin næstan avfólkað um veturin. Tí eri eg sera fegin um, at vit hava verið í Fugloy og filmað lívið, sum tað er nú, sigur hann.

– Eg vil vísa lívið í Fugloy, og at tað finnist eitt sovorðið stað í ríkinum, sum kann tykjast so fremmant og fjarskotið, men har mann hugsar somu tankar sum fólk alla aðrastaðni. Í grundini eru vit sum menniskju eins, líkamikið um vit búgva í einum stórbýi ella á einari lítlari oyggj.

– Eg kundi hugsað mær at farið aftur til Fugloyar at filma um veturin, tá ið lívið helst er nakað øðrvísi, enn tað er um summarið. Vónandi kann tað lata seg gera.

Anders Lund Madsen er bitin av Fugloynni, og hann hugsar sær at vitja aftur har.

– Eg vil gjarna frætta, um tað verður okkurt hús til sølu í Fugloy, tí eg kundi saktans hugsað mær at fingið eitt summarhús har einaferð. Eg fari at liggja framvið, um okkurt hús verður tøkt at keypa, sigur hann.

Tá ið hann verður spurdur, um tað er okkurt í Fugloynni, sum hann kundi hugsað sær at tikið við til Danmarkar, svarar hann:

– Mær dámdi sera væl allan matin og friðin, Símun Gullaksen og fólkini, men eg kann líkasum ikki taka tað við mær. Heldur leingist eg aftur til Fugloyar. Fái eg eini summarhús har einaferð, kann eg sita og stara eystur í hav. Eg haldi, at tað er hugtakandi, hóast eg veit, at langt frá øll høvdu trivist í Fugloy, sigur Anders Lund Madsen.



*Símun Gullaksen, bóndi, og Anders Lund Madsen práta*